menta
skrásettir grannskoðarar

# Judo Føroyar

# Tórshavn

(V-tal 358.665/611.050)

# Ársfrásøgn

# 2023

Ársfrásøgnin framløgd og góðkend á aðalfundi tann 20 / 8 2024

fundarstjóri

RO2023.920/MN

# INNIHALDSYVIRLIT


| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðsluátekning | 3 |
| Vátta frá óheftum grannskoðara | 4 - 5 |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 - 7 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 10 - 12 |

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Judo Føroyar<br>Gundadalur<br>P.O. boks 223<br>FO-110 Tórshavn | |
| | T-postur: | judo@judo.fo |
| | Heimasíða: | www.judo.fo |
| | Telefon: | 31 76 85 |
| | Telefaks: | 31 24 21 |
| | V-tal: | 358.665/611.050 |
| | Roknskaparár: | 1. januar til 31. desember |
| **Nevnd** | Sofus Debes Johannesen, formaður<br>Kristianna Solberg á Túgvu, næstforkvinna<br>Petur Sigurð Johannesen, skrivari<br>Silja Johannesen, nevndarlimur<br>Andrias Sumberg, nevndarlimur | |
| **Grannskoðari** | **MENTA**<br>skrásettir grannskoðarar Sp/f<br>J. Broncksgøta 16<br>Postboks 16, FO-110 Tórshavn<br>Telefon 780 900, Telefax 319 640<br>t-postur: menta@menta.fo<br>www.menta.fo | |

## LEIÐSLUÁTEKNING

Nevndin, ið hevur ábyrgdina av ársfrásøgnini, hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2023 hjá Judo Føroyar.

Ársfrásøgnin er sett upp samsvarandi lógum felagsins og tillagað ásetingunum í galdandi føroyskum roknskaparleiðbeiningum, umframt eftir kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi soleiðis, at ársfrásøgnin vísir eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparárinum.

Ársfrásøgnin fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2023 verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 20 / 8 2024

Nevnd:

Sofus Debes Johannesen,
formaður

Kristianna Solberg á Túgvu,
næstforkvinna

Petur Sigurð Johannesen,
Skrivari

Silja Johannesen,
nevndarlimur

~~Sigmundur Johansen~~
nevndarlimur
Andrias Sumberg

# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til limirnar í Judo Føroyar**

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Judo Føroyar fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir niðanfyri ásettu roknskaparreglum og kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan..

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2023, og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2023 samsvarandi nýttu roknskaparreglum.

**Grundarlag undir niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir fyri grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er neyvari útgreinað í brotinum niðanfyri "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisk krøv fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Nevndarábyrgd**
Nevndin hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttar roknskaparreglur. Nevndin hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið nevndin metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd nevndsins at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og, har tað hevur týdning, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at nevndin hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella, at nevndin í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um teir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um sannlíkindi eru fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiði, sum hesir váðar krevja, og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villeiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitum.

- Taka støðu til, um tann roknskaparháttur sum nevndin nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftu upplýsingarnar, sum nevndin hevur gjørt, eru rímiligar.

- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at nevndin hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskifti, sum kunnu hava við sær týðandi óvissu, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum.
  Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskifti í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið tillaga okkara niðurstøðu.
  Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

- Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskifti í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið, tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

Vit samskifta við nevndina um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eyleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 20/8 2024

**MENTA Sp/f**
skrásettir grannskoðarar

Alvi S. S. Nielsen
skrás. grannskoðari

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

### Alment
Ársfrásøgnin er gjørd eftir niðanfyri standandi roknskaparreglum og kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá í fjør.

### Alment um innrokning og virðisáseting
Inntøkur verða rakstrarførdar, so hvørt sum tær verða vunnar. Sama er við virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum svarandi til roknskaparárið, verður rakstrarførdur við av- og niðurskrivingum, avsettum skyldum og afturføringum frá broyttum roknskaparligum metingum, ið áður eru innroknaðar í roknskapin.

Ognir og skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum tilgóðar og virðið á ognunum og skyldunum kann metast álítandi. Ogn og skyldur verða fyrstu ferð tiknar við til útveganarvirði og eftir tað verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum gjøllari lýst niðanfyri.

Tá ið ogn og skyldur verða innroknaðar og virðisásettar, verður lagt upp fyri væntaðum tapi og váða, ið vísir seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum avsanna ella sanna viðurskifti, ið komu til greinar við ársfrásagnarframløgu.

Roknskaparliga virðið á im- og materiellu støðisognunum verður gjøgnumgingið árliga, fyri at gera av um ábendingar eru um virðisminking út um vanligu avskrivingina. Um so er, verður støðisognin niðurskrivað til tað lægra av endurútveganarvirðinum.

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur
Inntøkur eru árligur stuðul íroknað veddingarpeningur, sum ÍSF veitir felagnum til rakstur og útreiðslur ísv. kappinga- og ítróttatiltøk v.m.

### Rakstrarkostnaður
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

### Fremmand skuld
Øll stuttfreistað skuld verður tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virðið roknskapardagin.

### Veð- og eventualskyldur
Veð- og eventualskyldur verða upplýstar og avsettar eftir neyðugum tørvi aftast í ársfrásøgnini.

### Fíggjarpostar
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verða rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og -kostnaður frá innlánum umframt vanligur bankakostnaður.

## Fíggjarstøða

### Materiell støðisogn
Materiell støðisogn verður upptikin til útveganarvirði við frádrátti fyri samlaðum avskrivingum. Ella til endurvinningarvirðið, um tað er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Útveganarvirði eru kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at íløguni fram til, tá ið ognin verður tikin í nýtslu. Útveganarvirði fyri eina samlaða íløguogn verður býtt í ognarlutir, ið verða avskrivaðir hvør sær, um brúkstíðin av hvørjum ognarluti sær er ymisk.

Avskrivingar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð (livitíð) og ásett restvirði (scrapvirði) og verða gjørdar við eins upphæddum hvørt ár. Tilgongdir í árinum verða avskrivaðar frá keypsmánaði. Felagið hevur ásett hesar brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Rakstrartól | 10 ár | 10% |

Vinningur ella tap við sølu av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum sølupris, frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virði søludagin og rakstrarført undir avskrivingar.

### Tíðaravmarkingar
Tíðaravmarkað ogn er rakstrarkostnaður, ið hoyrir til komandi ár. Tíðaravmarkað skuld er roknað og avsett til sosial- og frítíðargjøld o.t.

### Peningur
Peningur er tøkur innlánspeningur.

### Áogn
Áogn verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, ið vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti og niðurskriving ímóti tapi.

# RAKSTRARROKNSKAPUR

1. januar - 31. desember

| | Notur | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | |
| Landskassastuðul frá ÍSF | | 540.594 | 558.103 |
| ÍSF Veddingarpengar | | 0 | 50.000 |
| Lýsingarinntøkur, landskappingin, menn | | 35.000 | 15.000 |
| Inntøkur fyri luttakarum/feløgum | | 68.209 | 29.846 |
| Aðrir stuðlar | | 0 | 15.047 |
| Aðrar inntøkur | | 0 | 1.800 |
| **Inntøkur íalt** | | **643.803** | **669.796** |
| **Kostnaðir** | | | |
| Útreiðslur, Úrvalsítrótt | 1 | 0 | -13.285 |
| Útreiðslur, Landslið | 2 | -264.563 | -669.198 |
| Útreiðslur, Føroyaleikir | 3 | 0 | -14.721 |
| Útreiðslur, Lands- / FM-kappingin | 4 | -31.016 | -29.127 |
| Útreiðslur, til skeið | 5 | -142.506 | -158.553 |
| Útreiðslur, til altjóða fundir | 6 | -72.506 | -55.558 |
| Kontrast FM - felags roknskapur | 7 | 3.000 | 0 |
| Felagskostnaður | 8 | -33.574 | -66.982 |
| Fyrisitingarútreiðslur | 9 | -121.822 | -106.542 |
| **Kostnaður í alt** | | **-662.987** | **-1.113.965** |
| **Rakstrarúrslit** | | **-19.184** | **-444.169** |
| Avskrivingar | 10 | -8.274 | -6.411 |
| **Úrslit, áðrenn fíggjarpostar** | | **-27.458** | **-450.580** |
| Fíggjarkostnaður o.t. | | -3.315 | -1.877 |
| **Ársúrslit** | | **-30.772** | **-452.458** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| OGN | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Mátta | | 77.247 | 64.826 |
| **Materiell støðisogn** | 9 | **77.247** | **64.826** |
| **Støðisogn** | | **77.247** | **64.826** |
| Skuldarar | | 62.654 | 56.162 |
| **Áogn** | | **62.654** | **56.162** |
| Tøkur peningur | | 143.735 | 143.700 |
| **Peningur** | | **143.735** | **143.700** |
| **Ogn í umferð** | | **206.389** | **199.862** |
| **OGN SAMANTALT** | | **283.635** | **264.688** |

| SKYLDUR | | | |
|---|---|---|---|
| Eginogn | | 17.714 | 470.172 |
| Ársúrslit | | -30.772 | -452.458 |
| **Eginpeningur** | | **-13.058** | **17.714** |
| Vøru- og tænastuognarar | | 296.693 | 246.973 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **296.693** | **246.973** |
| **Skuld** | | **296.693** | **246.973** |
| **SKYLDUR SAMANTALT** | | **283.635** | **264.688** |

| **Nota 1. Útreiðslur, Úrvalsítrótt** | **2023** | **2022** |
|---|---|---|
| Ferðaútreiðslur til og í útlandinum | 0 | -4.276 |
| Uppihald | 0 | -2.522 |
| Kostur | 0 | -1.043 |
| Aðrar útreiðslur | 0 | -5.444 |
| | **0** | **-13.285** |

| **Nota 2. Útreiðslur, landslið** | | |
|---|---|---|
| **Útreiðslur, manslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -86.068 | -200.439 |
| Uppihald í útlandinum | -50.725 | -104.912 |
| Kostur í útlandinum | -11.100 | -27.989 |
| Annað | -5.198 | -71.746 |
| **Útreiðslur, kvinnuslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -12.987 | -10.625 |
| Uppihald í útlandinum | -1.890 | -6.324 |
| Kostur í útlandinum | -797 | -1.881 |
| **Útreiðslur, Ungdóms kvinnuslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -28.740 | -56.017 |
| Kostur í útlandinum | -759 | -10.807 |
| Aðrar útreiðslur, ungdóms kvinnu-lið | -465 | -725 |
| **Útreiðslur, Ungdóms manslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -55.934 | -87.416 |
| Kostur í útlandinum | -759 | -14.529 |
| Annað | -465 | -1.108 |
| | **-264.563** | **-669.198** |

| **Nota 3. Útreiðslur, Føroyaleikir** | | |
|---|---|---|
| Uppihald - Føroyaleikir | 0 | -14.721 |
| | **0** | **-14.721** |

| **Nota 4. Útreiðslur Lands- / FM-kappingin** | | |
|---|---|---|
| Ferðakostnaður, Lands / FM-kappingar | -4.808 | -1.700 |
| Heiðursmerkir | -5.258 | -13.178 |
| Annað | -14.500 | -8.132 |
| **Útreiðslur Steypa- / Grans Prix-kappingin** | | |
| Heiðursmerkir | -6.450 | -6.117 |
| | **-31.016** | **-29.127** |

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Nota 5. Útreiðslur til skeið** | | |
| Løn/samsýning/kostnaður fyri skeiðshaldara | -4.340 | 0 |
| Ferðing og koyring | -33.643 | -45.567 |
| Uppihald og kostur, skeiðshaldari v.m. | -21.295 | -35.123 |
| Tilfarð | 0 | -110 |
| **Útreiðslur til dómaraskeið** | | |
| Ferðing og koyring, dómaraskeið | -27.026 | -45.238 |
| Uppihald til dómaraskeið | -25.962 | -17.125 |
| Kostur til dómaraskeið | -311 | -2.457 |
| Aðrar útreiðslur til dómarskeið | 0 | -3.676 |
| **Útreiðslur til venjaraskeið** | | |
| Ferðaútreiðslur | -11.912 | -3.567 |
| Aðrar útreiðslur | -1.500 | -2.490 |
| Kostur til venjaraskeið | -4.169 | -3.200 |
| | **-142.506** | **-158.553** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 6. Útreiðslur til altjóða fundir** | | |
| Ferðakostnaður | -31.131 | -38.998 |
| Uppihald | -41.375 | -13.237 |
| Annað | 0 | -3.323 |
| | **-72.506** | **-55.558** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 7. Kontrast FM - felags roknskapur** | | |
| Stuðulsinntøkur | 20.000 | 0 |
| Atgongumerkir | 5.900 | 0 |
| Inngjald frá Sersambondum | 30.000 | 0 |
| Gjald fyri veistlu | 54.000 | 0 |
| Útreiðslur fyri veitslu | -100.878 | 0 |
| Annað | -6.022 | 0 |
| | **3.000** | **0** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 8. Felagskostnaður** | | |
| Fundarútreiðslur | -84 | -250 |
| Umboðan | -3.915 | -11.037 |
| Limagjøld | -14.914 | -14.911 |
| Klæðir - Búnar | -5.176 | -33.736 |
| Heimasíða | -9.485 | -6.860 |
| Annað | 0 | -188 |
| | **-33.574** | **-66.982** |

### Nota 8. Fyrisitingarútreiðslur

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Skrivstovuhald | -18.613 | -17.937 |
| Tól, teldur oa | -40.050 | -43.592 |
| Telefon, fax og internet | -11.505 | -15.125 |
| Bókhald | -11.250 | -11.000 |
| Grannskoðan | -13.000 | -7.994 |
| Avsett ímóti tapi, áogn | -17.738 | 0 |
| Flytingarprov. | -7.932 | -7.889 |
| Aðrar útreiðslur | -1.734 | -3.006 |
| | **-121.822** | **-106.542** |

### Nota 9. Støðisogn

| | Rakstrartól | Rakstrartól |
|---|---|---|
| Útvegnarvirði, primo | 71.238 | 0 |
| Tilgongd i árinum | 20.694 | 71.238 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| Útveganarvirði, ultimo | 91.932 | 71.238 |
| Avskrivað primo | -6.411 | 0 |
| Avskrivað í árinum | -8.274 | -6.411 |
| Avskrivað ultimo | -14.685 | -6.411 |
| **Virði 31.12.2022** | 77.247 | 64.826 |

### Nota 10. Veðsetingar og eventualskyldur

Sersambandið hevur ongar veðsetingar við roknskaparlok, men hevur afturgjaldsskyldur mótvegis ÍSF